Búskapur og vinna:

## Nógv færri flúgva

Norsk flogferðsla er á veg móti einari kreppu. Ein uppgerð fyri innanríkis- og uttanríkis flogferðsluna tann fyrsta ársfjórðingin í ár vísir, at hesar tríggjar mánaðarnar flugu 470.000 færri fólk enn somu mánaðir í fjør. Ferðafólkatalið er so nógv minkað, at norðmenn noyðast aftur til 1997 fyri at finna tøl, sum líkjast teimum í ár. Afturgongin í fyrsta ársfjórðingi svarar sambært blaðnum Aftenposten til, at 3760 flogfør, sum flugu fullsett í fjør, hava flogið tóm í ár.

Tey, sum hava samband við norsku flogferðsluna, eru á einum máli um orsøkina til ta stóru afturgongdina: Tað er heilt einfalt ov dýrt at flúgva í og úr Noregi. Tey vísa á, at atsóknin í USA 11. september í fjør kann neyvan vera orsøkin, tí tann størsta afturgongdin í fyrsta ársfjórðingi var á innanríkisrutunum.

## Svenska rentan upp

Svenski ríkisbankin hækkaði fríggadagin rentuna 0,25%, so hon nú er 4,25%. Ríkisbankin sigur, at rentuhækkingin er neyðug, tí inflasjónin í Svøríki er ov stór, og harafturat sigur bankin, at hækkingin hevur samband við tær nýggjstu metingarnar um búskapargongdina í landinum.

Búskaparfrøðingurin hjá sosialdemokratiska stjórnarflokkinum, Sandro Socco, er ikki heilt samdur við ríkisbankanum. Socco sigur við Aftonbladet, at eftir hansara tykki er tað ikki rætt at hækka rentuna júst nú.

## Framgongd

Amerikanska handilskamarið kunngjørdi fríggjadagin, at búskaparvøksturin í USA var heili 5,8% í fyrsta ársfjórðingi. Hetta er størsti búskaparvøksturin í einum ársfjórðingi seinastu tvey árini.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Amnesty leggur Ísrael undir krígsbrotsverk



*Sambært Amnesty International oyðilegði ísraelski herurin umleið 800 hús í flóttafólkaleguni Jenin*

*Mynd: Reuters*

**Ein av mannarættindaserfrøðingunum hjá Amnesty International sigur ongan iva vera um, at ísraelski herurin gjørdi seg sekan í krígsbrotsverki í flóttafólkaleguni Jenin**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

David Holley, mannarættindaserfrøðingur hjá Amnesty International, segði við fronsku tíðindastovuna AFP í gjár, at tað er einki at ivast í, at teir ísraelsku hermenninir vóru í hørðum bardaga við palestinar, og at ísraelski herurin hevði rætt til at oyðileggja hús, sum teir vápnaðu palestinararnir høvdu víðgyrt seg í.

Men viðurskiftini í Jenin vísa sambært David Holley, at ísraelski herurin kann ikki hava oyðilagt øll tey nógvu húsini undir sjálvum bardøgunum við palestinararnar, men at herurin oyðilegði nógv av húsunum, aftan á at bardagarnir vóru lidnir.

- Tí var her talan um eina skipaða revsing, og tað er krígsbrotsverk, segði David Holley við AFP.

Leiðarin fyri norsku deildini hjá Amnesty International, Petter Eide, er heldur ikki í iva um, at ísraelski herurin er sekur í krígsbrotsverki í Jenin. Hann vísir á, at bardagarnar millum ísraelsku hermenninar og palestinararnar í Jenin byrjaðu tann 4. apríl, og at ísraelsmenn høvdu fult hernaðarligt tamarhald á leguni tann 10 apríl, tá bardagarnir eisini steðgaðu.

- Men eftir tann 10. apríl bumbaðu ísralsmenn Jenin, og teir sendu eisini fleiri gravkýr inn í leguna at oyðileggja hús og annað, sigur Petter Eide, sum leggur afturat, at ísraelsku álopini eftir tann 10. apríl høvdu einki hernaðarligt endamál og kunnu tí ikki tulkast sum annað enn ein roynd at revsa og at eyðmíkja tað palestinska fólkið.

Petter Eide leggur dent á, at eftir tann 10. apríl átti Ísrael at laga seg eftir tí, sum Geneve-sáttmálin sigur um skyldurnar hjá einum hersetingarvaldi, men tað gjørdi ísraelski herurin ikki og breyt tí ásetingarnar í sáttmálanum, sigur leiðarin í norsku Amnesty-deildini.

# Tornado-ódn í USA

**Minst fimm fólk doyðu, tá ein røð av tornadoum rakti fleiri statir í USA sunnudagin**

USA
*Árni Joensen*

Í minsta lagi fimm fólk doyðu, og fleiri fingu skaða, tá ein røð av tornado'um rakti fleiri amerikanskar statir sunnudagin. Myndugleikarnir siga, at teir skrásettu fimtan harðar tornado'ir, men at tær helst mundu vera upp ímóti hundrað í tali.

Í statinum Virginina stutt sunnan fyri høvuðsstaðin Washington oyðilegði ódnarveðrið fleiri hús, og í Illinois vórðu nógv trø skrykt upp við rót. Bæði í Virginia og Illinois var kavarok, og sagt verður, at heglingurin var sum golfkúlur til støddar. So langt norðuri sum í New York var eisini ódnarveður.

Í gjár arbeiddu bjargingarlið við at hjálpa teimum, sum høvdu mist hús og heim. Samstundis leitaðu bjargingarmenninir eftir fólki, sum ikki vóru komin afturíaftur, og tí stúrdu myndugleikarnir fyri, at ódnarveðrið kundi hava kravt fleiri enn fimm mannalív.

Tað er vanligt, at tornado'ir herja í USA hesa tíðina á árinum, men í ár eru tær komnar heldur seinni enn vanligt. Amerikansku veðurmenninir hava annars sagt, at tornado'ir kunnu koma alt árið, men at møguleikin ella vandin er størstur um várið og tíðliga um summarið.

Ódnarveður við tornado'um kann bresta á, tá teir køldu luftstreymarnir norðaneftir møta teimum lýggjaru luftstreymunum, sum koma úr Meksikanska Flógvanum. Vanliga hendir hetta miðskeiðis í USA.

Úr Norðurlondum:

## Umvæla Barceback

Um fjúrtan dagar verður farið undir at umvæla nakrar av teimum týdningarmestu pørtunum á svenska kjarn orkuverkinum Barceback. Arbeiðið er so umfatandi, at tað fer helst at taka eini trý ár.

Leiðslan á kjarnorkuverkinum sigur, at reaktorur nummar tvey, sum varð settur í gongd í 1977, skal umvælast og hava ymsar trygdarábøtur. Reaktorur nummar eitt varð sløktur tann 30. november í 1999.

Donsku myndugleikarnir hava fleiri ferðir kravt, at Barseback-verkið skal lata aftur. Sambært einari ætlan hjá stjórnini í Stockholm skal verkið lata aftur næsta ár, og næsta vár skal svenski Ríkisdagurin taka støðu til málið.

### Í stríð móti Islam

Fleiri danskar fríkirkjur ætla at taka seg saman til eitt stríð ímóti Islam. Ein av undangongumonnunum, preturin David Hansen úr meinigheitini Aalborg Menighedscenter, sigur, at andin aftan fyri Islam er lívshættisligur, og at tað er umráðandi hjá kristindóminum at steðga teimum víðgongdu islamsku bólkunum. Á islamsku-kristiligu miðstøðini harmast tey ætlanina hjá fríkirkjunm, tí tey bra ótta fyri, at avgerðin fer at avlaga teyv veruligu viðurskiftini.

Umleið 100.000 fólk eru í teimum donsku fríkirkjunum.

### Hagen heldur fram

Formaðurin í norska Fraburðsflokkinum, Carl I. Hagen, heldur fram sum floksformaður. Á landsfundi hjá flokkinum um vikuskifti var einki annað formansvalevni, og Hagen fekk 206 av teimum 207 atkvøðunum. Tann eina var blonk.



# Keðiligt ikki at fáa fisk aðrastaðni

**– Tað er rættiliga keðiligt, at vit ikki kunnu keypa fisk á uppboðssølunum á Toftum, Vági og Sørvági, sigur stjórin á Norðurfisk í Árnafirði.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*– Í seinastuni hevur prísurin á tí smáa toskinum táttað upp ímóti prísinum á tí størra fiskinum, sigur stjórin á Norðurfisk í Árnafirði, John Høj*

Á lítla flakavirknum, Norðurfisk í Árnafirði, arbeiða tey hvønn dag, hóast verkfall er.

– Høvdu vit havt tunnilin, kundi Skipara-og Navigatørfelagið verið í verkfalli so leingi, teimum lysti. Tað er útjaðarin, sum er raktur og ikki tey, sum starvast inni á meginlandinum.

Soleiðis tekur John Høj, stjóri á Norðurfisk, til, tá ið vit spyrja hann, hvussu gongst, nú verkfall er.

### Útjaðarin raktur

Hann sigur, at tey merkja lítið og einki til verkfallið, tí virkið fær nóg mikið av fiski í Klaksvík, og haraftrat sigla farmaskip eisini av Klaksvík.

– Men tað er rættiliga keðiligt, at vit ikki kunnu keypa fisk á uppboðssølunum á Toftum, Vági og Sørvági.

Hann vísir á, at hóast Norðurfisk er eitt lítið flakavirki, so er tað spesialiserað á tann hátt, at tey arbeiða mest smáan fisk, serliga tosk, hýsu, hvíting og upsa.

– Vit keypa fisk um alt landið og eisini á Sandi, tá ið tað liggur soleiðis fyri. Hetta ber ikki til, nú verkfall er, og tað er rættiliga keðiligt, sigur John Høj.

Norðurfisk er annars eitt vanligt flakavirki, sum virkar fryst fløk til ávísar keyparar, ið serliga vilja hava tann smáa fiskin.

Á virkinum arbeiða eini 20 fólk.

### Smái fiskurin er dýrur

John sigur, at í seinastuni hevur smái fiskurin verið lutfalsliga dýrur at keypa, og serliga er tað tann smái toskurin, sum í prísi hevur táttað væl upp ímóti tí størra fiskinum.

– Vanliga er smái fiskurin væl bíligari enn tann størri fiskurin, men munurin hevur verið minni í seinastuni.

Spurdur, hvør orsøkin er til, at prísmunurin er minkaður, sigur John, at treki saltfiskamarknaðurin er ein orsøkin. Ein onnur er, at útflytarar, sum keypa og selja heilan fisk av landinum, trýsta prísin á smáa fiskinum uppeftir.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg

ÚTBÚGVING OG FRAMTÍÐ



KATRIN DAHL JAKOBSEN
JAVNAÐARFLOKKURIN